## Spæla um evsta plássið

Upp- og niðurflytingardystirnir millum KÍF, sum er aftast í Eik-liguni, og Ternuna, sum er fremst í 1. deild, verða næstu tvey mikukvøldini, fyrst í ítróttarhøllini í Kollafirði mikukvøldið 17. mars klokkan 19 og síðani í høllini í Tofta skúla mikukvøldið 24. mars klokkan 19. Spælt verður best av trimum dystum, og skal ein triði og avgerandi dystur til, verður hann á uttanveltaðum vølli.



## Kappast í Klaksvík

Árliga Klaksvíks-kappingin, sum KÍ skipar fyri, verður um vikuskiftið. Lagt verður fyri við innleiðandi dystunum í morgin, tá ÍF og KÍ spæla klokkan 13, og síðani TB og B68 klokkan 15. Sunnudagin verða so teir báðir seinnu dystirnir í kappingini, tá vinnararnir frá degnum fyri spæla finaluna og tapararnir spæla um triðja plássið.

# Forfinala um finaludyst



Bæði Mjølnir og SÍ hyggja uppeftir, tí vinnarin av dystinum teirra millum í morgin, vinnur heimavøll í einari møguligari triðju FM-finalu

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

**Tá Mjølnir og SÍ møtast í Klaksvík í morgin, stendur ein møguligur triði FM-finaludystur upp á spæl**




Hilmar Jan Hansen

Síðstu mongu vikurnar hevur ikki verið tann stóri spenningurin í Eik-liguni hjá monnum, men nú seinasta umfarið er á skránni, er – um ikki annað – eitt sindur at spæla um hjá teimum báðum fremstu liðunum, Mjølnir og SÍ, sum eisini møttust í steypafinaluni herfyri.

Tað er langt síðani greitt, at tey bæði liðini komu í finaluna, men av tí at bara eitt stig er millum teirra, verður dysturin í morgin avgerandi fyri, hvat av liðunum endar ovast í landskappingini. Og síðuvinningurin har er, at endaliga oddaliðið fær rætt til heimavøll í einari møguligari triðju FM-finalu.

ÍF tekur ímóti Fleyr í hesum seinasta umfarinum, har mest spennandi løtan man vera eftir dystin, tá bronsuheiðursmerkini verða handað Fleyr, sum tað mesta av kappingarárinum hevur ligið sum nummar trý.

### Bronsufinala

Í Eik-liguni hjá kvinnum er longu greitt, at tað verða SÍ og TB, sum skulu spæla FM-finalurnar, og sjálvt um SÍ enntá skuldi tapt fyri KÍF, missa sørvágskvinnur ikki fremsta plássið og heimavøllin í møguligu triðju finaluni, tí settmunurin er +33 ímóti +24 hjá TB, sum tekur ímóti Drátti hesa ferð.

Hinvegin er broddur í dystinum millum tey bæði »gomlu« flogbóltsfeløgini, Fleyr og Mjølnir, tí har kemur vinnarin við vissu at standa eftir við bronsumerkjunum. Mjølnir er undan dystinum í morgin eitt stig frammanfyri og hevur kanska sálarliga fyrimunin, men vinnur Fleyr, fer liðið framum og tekur bronsuna.

## Opin kapping á Tórsbreyt

Í morgin skipar Hvirlan fyri opnari kapping á Tórsbreyt í Havn, har kappast verður í spjótkasti, klingruvarpi og trístøkki. Hetta er ein kapping, har møguleiki er hjá íðkarum at betra síni met ella at finna útav, hvørjum stigi teir eru á.

Kappingarnar í spjótkasti og trístøkki er fyri tey, sum eru fødd í 1998 ella seinni, meðan kappingin í klingruvarpi er fyri tey, sum eru fødd í 1996 ella seinni.

Byrjað verður í morginári klokkan 10, og tilmeldingarfreistin er úti í kvøld klokkan 22.

hil

# Alt kann framvegis henda

**Enn eru somu fimm liðini kandidatar til bæði finaluplláss og aftasta pláss í Atlantic Airways-kappingini, so har er framvegis nerv í mestsum hvørjum dysti**




Hilmar Jan Hansen

At breið semja tykist vera um, at bestu deildirnar hjá kvinnum og monnum í hondbólti skulu víðkast komandi kappingarár, merkir samstundis, at umleið helvtin av tí sera stóra spenninginum, sum hevur verið í Atlantic Airways-kappingini, er hørvin sum døgg fyri sól.

Frammanundan hevur tað verið ein spurningur um lív ella deyð hjá teimum fimm liðunum, sum liggja niðan fyri Neistan og berjast, tí tey øll hava verið bæði finalu- og niðurflytingarkandidatar. Nú er tað stórt sæð bara finaluplássið ímóti Neistanum, tey hava at spæla um hesi síðstu fýra umførini, ið eftir eru.

### Púra opnir dystir

Tað er hinvegin ikki til at siga, hvørjum teir ymsu dystirnir enda við, tí sjálvt ikki Neistin sleppur undan tapum, samstundis sum hini fimm skiftast um at spenna bein fyri hvørtannað. Hesa ferð skal Neistin til Kollafjarðar, har tað fyrr í vetur endaði við, at KÍF vann – so alt kann henda.

Gamli klassikarin millum Kyndil og VÍF er eisini ein av dystunum, og har fæst so at síggja, um VÍF stormar víðari ímóti finaluni, ella um Kyndil skal gera ein vørr. Í triðja dystinum, sum er millum StÍF og H71, ræður ikki minst um hjá hoyvíkingum at vinna, skulu teir aftur hava kjans at koma í finaluna í ár.

### Alt er avgjørt

Er eitt vet av spenningi eftir í manskappingini, so er púra einki eftir av tí slagnum í Sunset-kappingini, sum er uppaftur nærri endanum, tí har bara eru tvey umfør eftir. Stjørnan og Tjaldur eru í finaluni, Neistin vinnur bronsuna, og so er VB aftast – men tó helst við ongum niðurflytingarvanda hangandi yvir sær kortini.

Tey bæði fremstu liðini spæla bæði á heimavølli, men tó ímóti liðum, ið kunnu geva mótstøðu. Stjørnan og VÍF endurtaka steypafinaluna hjá kvinnum, samstundis sum Neistin aftur hesa ferð fer at vita, um tað ber til at kløkka annað av liðunum omanfyri – hesa ferð Tjaldur.

Í hinum endanum er so eisini dystur millum StÍF og VB, har strandakvinnur mugu roknast sum favorittar ímóti VB, ið neyvan kemur av aftasta plássinum.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 14/03 | 14.30 | StÍF-VB |
| 14/03 | 15.00 | Stjørnan-VÍF |
| 14/03 | 15.00 | Tjaldur-Neistin |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 14/03 | 16.00 | KÍF-Neistin |
| 14/03 | 16.00 | Kyndil-VÍF |
| 14/03 | 16.00 | StÍF-H71 |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 13/03 | 11.30 | Fleyr-Mjølnir |
| 13/03 | 14.00 | KÍF-SÍ |
| 13/03 | 14.00 | TB-Dráttur |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 13/03 | 14.00 | ÍF-Fleyr |
| 13/03 | 16.00 | Mjølnir-SÍ |

### Fótbóltur

**Stórsteypadystur**

| | | |
|---|---|---|
| 14/03 | 15.00 | HB-Víkingur |